Fylgiskjal 29

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
110 Tórshavn

Nólsoy 15. Januar 2020

**Hoyringssvar í samband við broytingaruppskot til løgtingslóg um vælferð og tvingsul**

**Viðmerkingar til broytingar í vælferðarlógini**

Heilafelagið fegnast um tær broytingar sum eru lýsar í hesum hoyringsuppskoti til lóg um vælferð, tí um vit hava skilt tær rætt so betra tær um nøkur viðurskifti hjá borgarum í mun til fyrra hoyringsuppskotið.

Tó er henda viðkerking til lóg um vælferð § 25:

Heilafelagið vil gera vart við at geinin snýr seg um onnur enn børn og eigur broytingin tí at fevna um allar teir persónsbólkar ið nevndir eru í §25, eisini fólk við seinheilaskaða.

Sum yvirskipaðar viðmerkingar ynskja vit at leggja dent á, at lóg um vælferð eigur at tryggja borgarum við seinheilaskaða at:

- **Rætturin til rehabiltering skal tryggjast við lóg** – ikki bert sum rammulóg men sum avgerandi rættur
- **Rætturin til viðlíkahaldsvenjing skal tryggjast við lóg** – ikki bert sum rammulóg men sum avgerðandi rættur

**Viðmerkingar til broytingar í lóg um tvingsul**

Sum ískoyti til okkara hoyringssvar í 2019 vilja vit leggja dent á at eingin góðkenning av tvingsuli eigur at latast sum ein blankokekkur og tí fegnsat vit um at §29,5 stk verður broytt.

Sostatt er einki av hesum nevndu átøkum sum hevur óavmarkaða gildistíð.

Spurnaðartekin veður sett við hví góðkenning av inntrivi sambært §9 er longt úr 12 mánaðum til 24 mánaðar?

Heilafelagið undrast á hví góðkenning av tvingsli verður latin yvir ymisk tíðarskeið á 6, 12 og 24 mánaðir. Tvingsul eigur ikki at vera ein arbeiðsháttur, men bert ein til tíðir neyðugur lutur í arbeiðnum við børnum, ungum og vaksnum í serligum støðum. Heilafelagið metir at betri

**Heilafelagið**
**Felagið fyri apopleksi - og afasirakt**
**Íslandsvegur 10 c.**
**FO - 100 Tórshavn**
heilaf@olivant.fo

normeringar og tað at starvsfólk ikki arbeiða einsamøll, umframt eitt gott fakligt innlit, kann forða fyri tvingsuli í nógvum førum.

***Tvingsul og sjálvavgerðarrættur - viðmerkingar frá 14.9.2018***

*Spurningur: Hvat merkir týðandi sálarligur virkisførleiki? Tídningarmikið er, at starvsfólk eru kunnaði um ST sáttmálan og kenna greinarnar og skilja ásetingarnar um hvat sjálvsavgerðarrættur merkir í ytstu meining. Borgari sum býr á stovni hjá eitt nú landi ella kommunu, skal vera vardur fyri tvingsli og álopi á sjálvsavgerðarrættin av øllum slagi. Sovorið sum niðrandi tala yvir høvdið á viðkomandi og happing eigur ikki at koma fyri og skal fyribyrgjast. Eitt nú eigur mistanki um ella framdur kynsligur ágangur móti borgarum at fráboðast alt fyri eitt og tað skal vera púra greitt hvussu ein fráboðar tílíkt. Eisini eigur arbeiðið at vera skipað á ein sovornan hátt, at vandin er minimalur fyri at tílíkur ágangur kann fara fram. Tað eigur ikki at ganga ov long tíð ímillum brúk av tvingsul og fráboðanir. Tað er eisini týdningarmikið at starvsfólk ikki eru einsamøll til arbeiðis, bæði fyri at stuðla hvør øðrum og til tess at óynsktur og* ***óneyðugur*** *tvingsul ikki kann koma fyri. Tað er týdningarmikið at starvsfólk verða debriefaði og fáa bjóðað hjálp eftir harðskapsstøður og aðrar traumatiskar støður. Fráboðanarskipan skal umhugsast og skal til eina og hvørja tíð verja bæði borgaran, ið fær hjálp og starvsfólkið sum er til arbeiðis. Hetta er ein avbera týdningarmikil lógarpartur og eigur at vera kunngjørdur á ein hátt har bæði barnið og borgarin við týðandi sálarligum virkistarni skilir hann (ella hevur møguleika at fráboða møgulig brot) og soleiðis at starvsfólk kenna týdningin av honum. Báðir partar eiga at vera vardir.*

Vegna Heilafelagið

Maud Wang Hansen

Forkvinna

**Heilafelagið**

**Felagið fyri apopleksi - og afasirakt**

**Íslandsvegur 10 c.**

**FO - 100 Tórshavn**

heilaf@olivant.fo